**Skúlastýrisfundur**

Dato: 03.06.2014

Tíð: 17:00 – 18.45

Til staðar: Jórun Simonsen, Andrea á Rípuni, Elspa Petersen, Tummas Marni Joensen, Heri Müller, Turid Vang Frederiksen og Høgni Warberg

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1. Góðkenna seinastu fundarfrágreiðing
2. Nýtt um heimasíðuna
3. Garðdagur ella "Várhugni"
4. Aðalfundur Heim og skúli 3. mai, var nakar?
5. Trivnaðarkanning?
6. Samskipan av undirvísing (VÍF) Høgni tosar við skúlastjóran í Vestmanna
7. Skúlakoyringin, er tað nakað nýtt har?
8. Nýggj net/nót til málini
9. TMJ: Hví er nýhugsan/innovatión ikki ein partur av virðisgrundarlagnum?
10. Ymiskt

Att: 1: Fundarfrágreiðingin varð góðkend

Att 2: Viðvíkjandi nýggjari heimasíðu fer Høgni at kanna, um vit ikki fara at kunnu leggja heimaarbeiði o.l. út á vikuætlanina umvegis First Class. Aftaná verður skúlastýrið kunna umvegis teldupost.

Att 3: Ætlanin er at skipa fyri einum hugna, rørslu og spælidegi fyri næmingum og foreldrum í Kvívíkar skúla hósdagin 26. juni kl. 14:00 til umleið kl. 18:00. Hesin dagurin verður samstundis endabresturin á tí skemafríu ítróttar, heilsu og útivikuni. Hetta verður somuleiðis tann seinasti skúladagurin hjá næmingunum, og henda dagin møta næmingarnir ikki í skúla fyrr enn kl. 14. Lærararnir Turið og Turid skipa fyri og fyrireika dagin. Á skránni til henda dag, verður umframt mat og hugna, skipa fyri spølum, sum børnini ikki eru von at spæla, samstundis sum hesi spøl kunnu kveikja næmingarnar til onnur útispøl enn bara fótbólt

og hoppiband. Í samband við matin kann Jórun fáa til vegar eina stóra grill. Harumframt hevur hvør limur í skúlastýrinum hvør sína kaku við til dagin.

Att: 4: Eingin av okkum hevði verið til aðalfundin hjá felagnum Heim og skúli. Andrea hevði frætt, at tað bert vóru 6 fólk møtt upp til aðalfundin.

Att 5: Viðvíkjandi møguligari trivnaðarkanning fer Andrea at senda Høgna eitt dømi uppá eina trivnaðarkanning, sum vit møguliga kunnu nýta til Kvívíkar skúla.

Att 6: Høgni hevur tosað við skúlastjóran í Vestmanna skúla um samskipan undirvísing, soleiðis at tíðirnar koma at passa betur til venjingartíðirnar hjá VÍF. Í Kvívíkar skúla endar 5. tími kl: 12:20 og í Vestmanna kl: 12:35, í Kvívík endar 7. tími kl: 14:10 og í Vestmanna kl. 14:25, í Kvívík er eingin 8. tími og í Vestmanna endar 8. Tími kl: 15:20. Sambært stjóranum í Vestmanna skúla kunnu tey ikki broyta tíðirnar.

Att 7: Høgni hevur tosað við skúlastjóran í Vestmanna skúla, um teirra 7. tími kann enda 10 minuttir áðrenn, soleiðis at næmingarnir úr Kvívík kunnu fáa allan 7. tíma við og samstundis náa bussin til Kvívíkar. Sambært stjóranum í Vestmanna skúla kunnu tey ikki broyta hesa tíðina.

Att 8: Netini til málini á vøllinum eru illa slitin, og Høgni fer nú at biðja húsavørðin um at loysa henda trupulleika.

Att 9: Tosað varð um, hví nýhugsan/innovatión ikki er ein partur av virðisgrundarlagnum. Um nýhugsan skal verða partur av virðisgrundarlagnum, so má tað kunna undirbyggjast, m.a. við eini frágreiðing um, hvat liggur í tí, tvs. at tað ikki er bara nakað vit siga, men at vit gera tað vit siga. Vit tosaðu um munin millum nýhugsan (kreativitet) og íverksetan (innovatión). Í meðan nýhugsan (kreativitetur) snýr seg um at koma fram við nýggjum góðum hugskotum, so er íverksetan (innovatión) tað at seta hugskotini í verka, tvs. at realisere og praktisera nýggj góð hugskot. Til næsta fund skrivar Høgni nøkur orð, sum seta orð á og lýsa, hvussu nýhugsan kann inndragast í virðisgrundarlagið fyri Kvívíkar skúla.

Att 10: Høgni kunnar um, hvørjir lærarar verða í Kvívíkar skúla komandi skúlaár. Tórarinn N. Á Rípuni og Súsanna Mortensen koma aftur frá farloyvi, og ein lærari verður í næstum settur í tíðaravmarkað starv. Kvøldskúlaskeiðið í urtagarðsrøkt verður av ongum orsakað av ov lítlari undirtøku. Næsti fundur verður týsdagin 2. september kl. 17:15.

Vegna skúlastýrið
Høgni Warberg, Skrivari